# VEÐRIÐ VIÐ GØTUGJÓGV



# FEBRUAR 2024

# VEÐURSTOVA FØROYA

# Innihald

Gøtugjógv.....3
Veðrið í bygdini.....4
Norðan.....5
Landnyrðingur norðan.....6
Landnyrðingur.....6
Landnyrðingur eystan.....6
Eystan.....6
Landsynningur eystan.....7
Landsynningur.....7
Landsynningur sunnan.....7
Sunnan.....8
Útsynningur sunnan.....8
Útsynningur.....8
Útsynningur vestan.....9
Vestan.....9
Útnyrðingur vestan.....10
Útnyrðingur.....10
Útnyrðingur norðan.....10
Spurningar og svar.....**Fejl! Bogmærke er ikke defineret.**

**Dagfesting**: 27. februar 2024

**Staður**: Brandstøðin í Leirvík

**Heimildarfólk:** Sørin Djurhuus o.fl.

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

## Gøtugjógv

Við Gøtugjógv er bygd á Eysturoy, miðskeiðis á eystursíðuni, beint eystan fyri ta stóru gjónna, sum sker seg ígjøgnum lendið eystur- og vestureftir millum Norðra- og Syðrugøtu.

Bygdin er innast í Gøtuvík, sum er opin í ein landsynning. Víkin er umleið 6 km long út og inn, og í miðal góðar 2 km breið.

Úr bygdini slakar 3 km í útnyrðing, er fjallið Tyril (639m), og úr honum gongur ein fjallaryggur oman ímóti bygdini.

Gøtuvík gongur úr bygdini í landsynning. Úr eystri og upp ímóti norði á norðara armi av Gøtuvík er ein fjallarøð, sum ávirka veðrið í bygdini. Tey eru, roknað úr eystri ímóti norði:

- Gøtunestindur (625m) umleið 6 km eystan fyri bygdina
- Sigatindur (*í Gøtu kallaður Heimaritindur*) (612m) umleið 4 km í landnyrðing úr bygdini
- Frá Sigatindi og vestureftir ímóti Knúki (463m) er ein høg røð

Á sunnara armi á Gøtuvík eru eisini fjøll, sum bygdina ávirka veðrið í bygdini, og tey eru (*roknað úr suðuri*):

- Støðlafjall (517m) sunnan fyri bygdina
- Lítlafjall (*undir fjalli*) (274m) í útsynning úr bygdini




Mynd 1: Kort av Eysturoy. Gøtugjógv er bygd út ímóti Gøtuvík.



*Mynd 2: Gjógvin oman fyri bygdina, avmyndað í eystri.*

## Veðrið í bygdini

Fyri at fáa greiði á hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í bygdini við Gøtugjógv, hevur undirritaði fingið samband við Søren Djurhuus (**SD**), fráfarnar tilbúgvingarleiðara í Eysturkommunu. **SD** hevur sett seg í samband við 4 menn úr Gøtugjógv.

Teir 3 eru:

- Kári Hansen
- Jóannes Hansen
- Terje Hansen
- Sámal á Toftini

Við til samrøðuna í sløkkiliðstøðuni hjá Eysturkommunu í Leirvík hevði eg spurnarblað til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdin:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar. Nógvar av millumættunum hava sama veður við sær, sum heil- ella hálvættin beint við.

Spurningar og svar og aðrar viðmerkingar síggjast aftast í hesum skjali.




*Mynd 3: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Norðan kemur oman av Múlanum og er ein rímuliga góð ætt við Gøtugjógv, og vindurin er javnur – eisini tá ið tað er nógvur vindur.

Tað er ikki meira vindur í ættini, enn tað er aðrastaðni í landinum.

Norðan er eitt sindur vát, ein tolulig terraætt.

Eingin mjørki er av norði og heldur einki brim – men púra kyrt. Gott at rógva út úr suðurum.

Í illveðri á høgætt krokaðu russarar í klettin – upp í 100 skip viðhvørt. Var hetta á nýggjárinum, var eitt øgiligt fýrverkarí.

## Landnyrðingur norðan

Veðrið á landnyrðingi norði líkist nógv veðrinum á landnyrðingi. Tað hoyrist tó til meiri til hann í ringum veðri.

## Landnyrðingur

Landnyrðingur er besta ættin við Gøtugjógv. Vindurin er javnur, tá ið nógvur vindur er. Í góðveðri er stilli. Fjallarøðin ímillum Sigatind og Knúk verjir fyri ættini.



*Mynd 4: Ímóti landnyrðingi*

Yvirhøvur er altíð talan um minni vind, enn tað er kring landið.

Ættin er turr, og tað er lítið av mjørka. Viðhvørt er támut.

Brim er ikki við Gøtugjógv av landnyrðingi

## Landnyrðingur eystan

Veðrið á landnyrðingi eystri líkist veðrinum á landnyrðingi.

## Eystan

Tá ið hann liggur av eystri, kemur lotið undan Gøtunesi og heim eftir víkini.

Vindurin er rímuliga javnur við Gøtugjógv – ikki skaðaætt. Tað kann vera nógvur vindur í Syðrugøtu á eystri, meðan tað er fínasta veður við Gøtugjógv.

Tað er ikki meira vindur á ættini, enn tað er kring landið. Helst minni.

Eysturættin er nokkso vát. Tað kann vera heilt hampuliga turt viðhvørt, meðan tað er nógv regn norðalaga í landinum.

Tað kann vera nógvur mjørki á eystri, líka sum við øllum hinum eysturættunum.

Tað kann brima, men talan er ikki um nógv brim.

Yvirhøvur er eystan ein nøkulunda góð ætt við Gøtugjógv.

## Landsynningur eystan

Veðrið á landsynningi eystri er stórt sæð tað sama sum á landsynningi.

## Landsynningur

Landsynningur kemur beint heim eftir víkini. Vindurin erko javnur – ikki skaðaætt.



*Mynd 5: Gøtuvík opin ímóti landsynningi*

Vindferðin er tann sama sum fyri landið og kann hava nógv regn við sær.

Landsynningur er, sum hinar eysturættirnar, ein ring mjørkaætt við Gøtugjógv.

Nógv brim kann vera av landsynningi – tann ringasta ættin til brim.

Yvirhøvur er landsynningur ein ring ætt til brim og regn, men ikki til vind.

## Landsynningur sunnan

Veðrið við Gøtugjógv, tá ið ættin er landsynningur sunnan, líkist veðrinum á suðuri.



*Mynd 6: Ímóti landsynningi suðuri*

## Sunnan

Tá ið ættin er sunnan, kemur lotið oman av røðini norðan fyri Støðlafjall.

Sunnan er ein góð ætt. Vindurin er nokkso javnur, og vindferðin er sum fyri landið.

Ættin er ikki vát við Gøtugjógv – gott hoyggingarveður.

Tað er hvørki mjørki ella brim, tá ið hann er sunnan.

## Útsynningur sunnan

Veðrið á útsynningi suðuri við Gøtugjógv líkist veðrinum á útsynningi. Gott hoyggingarveður.

## Útsynningur

Tá ið ættin er útsynningur, kemur lotið oman av Hálsinum og tvørtur við bakkanum.



*Figure 7: Ímóti útsynningi*

Ættin er góð við Gøtugjógv – ikki skaðaætt, heldur ikki í stormi.

Vindferðin er atnn sama, sum hon er kring landið.

Útsynningur er ikki vátur, eingin mjørki ella brim.

## Útsynningur vestan

Veðrið á útsynningi vestri líkist veðrinum á vestri. Hann er tó ikki líka ringur sum vestan har norðuri í bygdini, men yviri í bygdini tað sama sum vestan.

## Vestan

Er ættin vestan, kemur lotið oman ígjøgnum Gjódal.

Henda ættin er tann ringasta ættin við Gøtugjógv, tá ið tað er nógvur vindur. Tá er hann er sera ójavnur.

Norðast í bygdini – Norðuri í Trøð – eru fólk stúrin, tá ið sagt verður frá nógvum vindi av vestri. Serliga tá ið hann er beint undir vestri. Tað kennist sum kanónskot, tá ið hann kemur oman ígjøgnum dalin.

Yviri í bygdini er ættin ikki líka ring, sum hon er har norðuri.

Meðan vestan er ein ring ætt í nógvum vindi við Gøtugjógv, er stilli í Norðragøtu.

Vindferðin á vestri er meiri við Gøtugjógv enn hon er kring landið.

Norðan er ikki ein vát ætt, tað er hvørki mjørki ella brim.

Í góðveðri er ættin góð í allari bygdini.

## Útnyrðingur vestan

Veðrið á útnyrðingi vestri líkist veðrinum útnyrðingi.

## Útnyrðingur

Tá ið ættin er útnyrðingur, kemur lotið oman av Múlanum. Ættin er ikki so galin við jøvnum vindi, og vindferðin er nakað tann sama, sum hon er kring landið.

Tað er eitt sindur vátt viðhvørt, men tað er hvørki mjørki ella brim á ættini.

## Útnyrðingur norðan

Veðrið á útnyrðingi norði líkist veðrinum á norði.